# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Nøkur orð til minnis um

# Jacob Højgaard

**9.7.1916 – 25.11.2007**

Góði abbi. Tað kennist løgið at skriva minningarorð um teg. Hóast tú nú ert okkum fjar, kennist tað, sum tú ert okkum so nær.

Tú hevði ein so stóran leiklut í okkara lívi.Tú vart so góður við dreingirnar, og teir við langabban. Ein fyrimyndarligur abbi, ið altíð putlaðist við okkurt: málaði og bøtti um húsini, hoyggjaði og fekst við seyðin. Tú sat sjáldan hendur í favn. Fórst á seiðaberg og gjørdi frikkadellir, bakaði pannukøkur og ringdi eftir okkum, tá tær vóru bakaðar.

Tú vart altíð so áhugaður í øllum, ið hendi uttanum teg, og fylgdi væl við, hvørjum vit høvdust at, og altíð vart tú klárur at hjálpa. Um tað so varð rabarbugarðurin, sum skuldi saksast, húsini klæðast ella okkurt stoypast. Bráður vart tú av lyndi, so tá tú vart uppií, gekk arbeiðið sum oftast skjótt fyri seg.

Ja raskur og framsíggin hevur tú altíð verið og at kunna verða við til at reka tað fyritøku víðari, sum tú vart við til at stovna, er okkum ein æra.

91 ár fekst tú her, og heilsuna hevði tú góða í tey 90. Tað er ikki øllum givið. Nú tú andaðist eftir ringa sjúkralegu, var tað gott hjá tær at fáa frið. Og samstundis sum vit syrgja, gleðast vit um, at tú við vissu kundi siga sum Paulus: Eg havi strítt hitt góða stríðið, havi fullrunnið skeiðið, havi varðveitt trúnna. Og nú liggur rættlætiskransurin goymdur til mín.

Við tær abbi hava vit mist ein av okkara bestu, trúføstu vinum, vegleiðarum og fyrimyndum.

Takk fyri alt abbi - minnini liva - vit síggjast!

**Bjørg og Álvur**
**Haraldur, Niklas og Jákup**





# Jósvein Østerø 70 ár

Í dag fyllir Jósvein Kruse Østerø í Klaksvík 70 ár. Jósvein er føddur á Trøllanesi, har hann sleit sínar barnaskógvar saman við systkjunum, Marjun, Páll, Hans Jacob, Ásu, Eiriki, Jógvan og Leivur. Av teimum eru Leivur og Erik farnir.

Foreldur teirra vóru Asta Maria Sunneva Olsen av Eiði og Absalon Østerø av Trøllanesi.

Í 1962 giftist Jósvein við Jastrid Oliviu Jacobinu Højbro og fingu tey børnini, Absalon føddur í 1962, Elin Súsanna í 1964, Anna í 1967, Joan í 1968, Jóannes í 1970 og Jóhanna í 1975. Jóannes doyði brádliga av sjúku knapt trý ára gamal. Abbabørnini eru 15 í tali.

Í fjør var Jósvein fyri tí stóru sorg at missa konu sína, sum doyði av krabbameini bert 64 ára gomul.

Jósvein er ein sera hegnigur og virkin maður, sum altíð hevur nóg mikið at gera og dugir mest sum alt.

Hann er fryntligur, skemtingarsamur, jaligur av lyndi og er altíð til reiðar at hjálpa, tá heitt verður á hann.

Sum ungur lærdi hann til jarnsmið í smiðjuni Ídni í Klaksvík og seinni fór hann á maskinskúla. Hann hevur fyri tað mesta arbeitt á landi, men var eisini eitt skifti til skips. Í nógv ár var hann vatnmeistari hjá Klaksvíkar kommunu og í nøkur ár starvaðist hann sum húsavørur í Drotningar Margrethu barnagarði. Barngóður sum hann er varð skjótt, at børnini í barnagarðinum kannaðu sær hann og kallaðu hann abbi.

Jósvein verður ynskt hjartaliga tillukku við føðingardegnum og Harrans signing á lívskvøldinum.

Føðingardagurin verður hildin í KFUM í kvøld frá klokkan 18.00.

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við

**Dagurin**
**29. november. Saturninus**. Fleiri halgimenni við hesum navni eru knýttir at degnum, men helst halda teir talan vera um fyrsta kristna biskupin í Toulouse í Fraklandi, sum varð tikin av døgum um ár 25